# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Anna Suffía Hentze í Trøðum á Sandi, vanliga Fía í Nýlendum, andaðist leygardagin á Áargarði, 90 ára gomul.

Mikkjal Nielsen verður kórsettur í Filipskirkjuni, Kastrupvej 57, 2300 Kjøpinhavn S, mikudagin 17. februar klokkan 12.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Aksal Olivur Holm**
Hvalba

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðini og takk fyri allar peningagávur.
Tøkk til øll tey mongum, sum fylgdu honum til hansara seinsta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til okkara systkinabørn við familju í Suðri.

**Meina**
**Anna og Katrin við familju**

## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
28. feb. verður Hildigarð Nattestad, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin 20. feb. í gistingarhúsinum í Øravík, kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. mars fyllur Henning Mortensen, Argjavegur 40, Argir, 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 28. feb. í AB-húsinum frá kl. 17.

**Gullbrúdleyp**
4. feb. høvdu Oda og Árni Frederiksberg á Strondum gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin friggjakvøldi 19. feb kl. 18 í Kelduni í Skálafirði. Øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. giftast Thomas F. Johannessen, Æðuvík, og Ann-Margit Hansen, Saltnes. Opið hús verður í Stóratún 14 frá kl. 18.

**Prógv**
Ragna Hentze, Trongisvágur, hevur tann 28. jan. 2010 lokið prógv, sum Prosessionsbachelor í námsfrøði á Danner seminariet.

**Prógv**
Poul Arni Jensen av Sandi, hevur 26.06.09 tikið prógv sum Dual Skipsførari. Bachelor of Maritime Transport and Nautical Science á Svendborg International Maritime Academy.

**Prógv**
Heðin Jensen av Sandi, hevur 22.01.10 tikið prógv sum Dual Senior officer (Skibsførari-Maskinmeistari-El.instalatør) á Svendborg International Maritime Academy.

# Birgir Waag Høgnesen 50 ár



Í dag fyllir Birgir Waag Høgnesen 50 ár.

Birgir er klaksvíkingur sum býr í Vestmanna. Hann er føddur í Klaksvík 16. februar 1960, sonur Linu, f. Danielsen (1927-2009), úr Húsavík, og Símun Waag Høgnesen í Klaksvík. Birgir er næstyngst av fimm brøðrum, teir eru: Manni, Ólavur, Høgni, Birgir og Ingi.

Onkur hevur í skemti sagt, at okkara starvsfelagi er eitt sosialt tilfeldi. Hann byrjaði nevniliga at selja Sosialar sum sjey ára gamal, og tað ger hann enn.

Birgir hevur helst fingið gott í beinini sum ungur sølumaður. Sum smádrongur gekk hann hús úr húsi í Klaksvík og seldi Sosialar fyri Villi Sørensen, blaðstjóra á Sosialinum, sum búði á Vágsheygnum í Klaksvík. Sum 13 ára gamal arbeiddi Birgir fyri fyritøkuna hjá Hugo Gardar og Landshandlinum eftir skúlatíð í sambandi við at vøra kom úr Havn við Pride. Seinni seldi hann nýggjar Yamaha knallertir og súkklur fyri mammubeiggjan Hilmar Danielsen og ymiskar billutir í egnum handli í Klaksvík.

Eftir lokna skúlagongd fór Birgir á kokkaskúla í Klaksvík og seinni á Føroya Fólkaháskúla.

Á Háskúlanum hitti hann konuna, Jónhild, dóttir Jóhann Elias og Emmu Poulsen í Vestmanna. Árið eftir fóru tey bæði, Jónhild og Birgir, á Uldum Højlskole í Danmark..

Júst soleiðis sum Birgir er her í Miðlahúhusinum, er hann ikki bangin fyri at royna nakað nýtt. Hann hevur t.d. eisini roynt sjólívið. Í 1976 og 1977 var hann við trolaranum Nónhamar sum annar kokkur, umframt at hann var fleiri snellutúrar í Íslandi við m.a. Juvel, Bragd (Gardar ) og Fuglberg.

Helst í tráanini eftir at sleppa at selja kom Birgir til Havnar í 1985, tá hann fekk starv sum sølumaður hjá bilasøluni Vilhelm Nielsen í J.Broncksgøtu, sum seldi Opel, Bedford og Isuzu bilar. Seinni gjørdist hann bilasølumaður hjá Bilfríðkan við Velbastaðvegin, har teir júst høvdu yvirtikið umboðini fyri BMW, Fiat og teir amerikansku Chevrolet.

Í 1990 tók hann við einum starvi, sum versfaðirin hevði røkt framman undan, at selja tryggingar í Norðstreymi. Longu árið eftir fór hann í fast starv í Havn sum tryggingarráðgevi hjá Føroya Lívstrygging og í samtakinum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Í 2005 tók hann við eini nýggjari avbjóðing sum sølumaður á heilt øðrum øki. Birgir fór í starv hjá telefyritøkuni TeleTech, har hann seldi tráðleyst internet og tænastur í tí sambandi.

Birgir hevur, síðan hann var heilt ungur, víst okkara blað, Sosialinum, áhuga. Í nógv ár sendi hann óbiðin inn myndir frá fótbólti, hondbólti og øðrum hendingum, har hann hevur verið staddur. Í 2007 kom hann í starv sum lýsingarsølumaður á Sosialinum og við ábyrgd av leysasøluni. Tá Sosialurin keypti útvarpsstøðina Rás2, varð hann settur sum marknaðarleiðari har. Hóast hann er marknaðarleiðari og sølumaður, er hann ikki bangin at veita ein hjálpandi hond, har tað er tørvur á tí. Ikki so fáar myndir koma í húsið frá honum framvegis, og altíð er hann klárur at gera eitt innslag, ella bæði tvey, sum bæði eru klipt og redigerað til Rás2, um so er at onnur ikki hava stundir.

Birgir hevur eisini verið politiskt virkin, m.a. var hann nevndarlimur í Norðoya Javnaðarfelag í 6 ár og í Norðstreymoyar Javnaðarfelag í 15 ár, harav í 8 ár sum formaður. Eisini sat hann í floksleiðslu Javnaðarflokksins í 9 ár.

Hann man hava dugnað flokkinum væl, tí tað sigur ikki so lítið at Birgir frá Javnaðarflokkinum fekk litið uppí hendi, at umboða flokkin í ymiskum nevndum. Hann sat í stýrinum fyri Landssjúkrahúsið í 9 ár og eitt stutt skifti sum formaður í kanningarnevndini fyri sjúklingahotellið Hotel Tórshavn, saman við Rúnu Sivertsen og Hergeir Nielsen. Í løgtingsvalnevndini fyri Norðstreym sat hann sum formaður í trý valskeið. Frá 2004 og fram til seinasta árskifti hevur hann sitið í Færøernes Ulykkesforsikringsråd.

Í Vestmanna sat hann tvey ár í barnaverndini hjá Vestmanna Kommunu, og síðan 2004 hevur hann verið limur í Brunanevndini í kommuni. Í tvey ár sat hann í umboðsráðnum fyri Tryggingarfelagið Føroyar

Birgir hevur altíð góð hugskot, og hevur hann sett sær nakað fyri, ja so fullførir hann tað - um hann so skal gera alt einsamallur. Hann var ein av stigtakarunum til Bóltfelagið "Æsir" í Vestmanna, Undirhúsið í Vestmanna og føroya fyrstu bátastevnuna sum var hildin fyrstu ferð fyri 8 árum síðan. Man kann róliga siga, at bátamentanin er markant broytt síðan tá.

Birgir hevur eisini roynt seg sum rithøvund. Í 2005 skrivaði hann bókina " Teir tóku kjansin", sum er um trolaran Kap Farvel, ið var heimahoyrandi í Vestmanna frá 1966 til 1975. Kenna vit hann rætt, er hetta neyvan hansara seinasta bókaverk.

Jónhild og Birgir høvdu silvurbrúðleyp 13. desember í fjør. Tey eiga fýra børn: Janie (1979), Durita (1985), Joan (1988) og Høgni (1993). Eisini eiga tey trý barnabørn: Teitur (2000), Ranja (2005) og Róar (2007), sum øll búgva í Kvívík.

Vit, starvsfólkini í Miðlahúsinum, ynskja okkara góða starvsfelaga hjartaliga tillukku við teimum fyrstu hálvthundrað árunum.

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 20. februar hava Dagny og Trygvi Askham gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni á Hotel Hafnia.



## Dagurin

**16. februar. Juliana**, deyð umleið ár 300. Vildi ikki giftast heidna trúlovaða sínum og varð tikin av døgum. Er eisini navn á tveimum øðrum halgikvinnum. Giljanna er føroyski navanformurin. Juliana er rómverskt ættarnavn. (Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*